**Í Dimmu 12. juli 2006**

## Tá vaktarskipið Tjaldrið kom til Føroyar.

Í dag - 14 juli - eru 30 ár liðin síðan vaktarskipið Tjaldrið kom til Føroyar á fyrsta sinni.

Tjaldrið er bygt á skipasmiðjuni Svolvær í Norðurnoregi og er bygginummar 5 á nevndu skipasmiðju.

Landstýrissamgongan frá 1970 til 1974 hevði tikið avgerð um at byggja vaktarskip.

Avgerðin var tikin við støði í einari løgtingslóg frá trýssunum, sum gav heimild til bygging av verjuskipi, og var tað táverandi landsstýrismaðurin í fiskivinumálum, Eli Nolsøe, sáli, sum á vári 1974, vegna Landstýrið, undirskrivaði sáttmálan um byggingina. Sambært sáttmálanum skuldi skipið handast Landsstýrinum um heystið í 1975.

Ymiskir trupulleikar tóku seg upp undir byggingini, av tí at skipasmiðjan í Svolvær ikki hevði nóg góðar royndir í bygging av so stórum skipum sum Tjaldrinum. Sostatt var skipið seinkað í umleið 9 mánaðir.

Kostnaðurin av byggingini var 14,3 mill. krónir, tá vóru 270.000 krónir farnar av kostnaðinum, sum skipasmiðjan í Svolvær fekk í dagbótum vegna seinkanina.

**Vaktar- og Bjargingartænastan.**

Vaktar-og Bjargingartænastan var sett á stovn í juni 1976. Hjalgrím Bech, orlogskapteinur - ættaður úr Vági og búsitandi í Danmark, var settur sum stjóri. Hann hevði starvast hjá donsku sjóverjuni í 25 ár Fyribils hevði hann fingið farloyvi frá donsku sjóverjuni í eitt ár. Hjalgrím var annars við í “Red Cruisader dramanum” tá Teddy Wood, skipari á Red Cruisader, tók “prisumanninga” hjá sjóverjuskipinum Niels Ebbesen sum gíslar

**Skipið verður navngivið.**

Leygardagin 20. mars 1976 var so dagurin, tá skipið skuldi navngevast. Á hátíðar-haldinum var tað Ása Justinusen, skrivstovukvinna í Landsstýrinum, sum doypti skipið við hesum væl valdu orðum.

Gævi Harrin við tær er
í tínum yrki á tíni ferð
Sjómarkið at verja
mót órætti at herja
neyðstøddum hjálp at veita.
Tjaldrið skalt tú eita.

**Tjaldrið verður tó liggjandi í Svolvær.**
Eftir at Tjaldrið var navngivið, fór tað tekniskan royndartúr. Ferðin á hesum túrinum var 14,5 sjómíl, men tá vísti tað seg, at okkurt var galið við undirstøðunum hjá motorunum, so teir vóru noyddir at rætta teir av nýggjum.

Tá hetta var gjørt, var farið nýggjan royndartúr, og nú vísti tað seg at ganga betur. Ferðin á hesum túri kom upp á knappar 16 sjómíl. Skipið hevur annars tveir motorar, hvør upp á 1200 hestakreftir.

**Loksins kundi Tjaldrið seta kós móti heimlandinum.**
Týskvøldið, 6. juli klokkan 22.15, var loyst frá bryggju í Svolvær. Kósin var sett suðuryvir, fram við norsku strondini.

Skipari hendan fyrsta túrin var Sámal Jákup Hansen. Sámal Jákup var í mong ár skipari hjá Strandferðsluni, eina mest á Teistanum og Dúgvuni, og hann gavst at sigla, tá hann kom til eftirlønaraldur. Hinir av manningini vóru stýrimaður Hanus Lassen, núverandi skipari á Smyrli. Maskinstjóri var Jóan Jakku Poulsen. Jóan Jakku sigldi við Tjaldrinum øll árini, áðrenn hann fór frá við eftirløn í 2001. 1. meistari var Andrias Samulsen. Andrias var annars í tænastu hjá Strandferðsluni í samfull 43 ár. Kokkur var Sámal Thomasen sáli, sum annars var kokkur við Dagstjørnuni. Matrósur var Óli Bech, sáli Hann sigldi annars sum bátsmaður við Smyrlunum í eitt mannaminni. Eisini við hendan túrin sum matrósur var J. R. Jacobsen, sum tá var stjóri á Strandferðsluni.

**Bíða í Bergen**
Tá komið var suður móti Bergen, var avgerð tikin um at fara inn til Bergen at bíða, tí at landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum, sum nú var Petur Reinert, sáli, ikki var staddur í Føroyum. Skipið átti ikki at koma á Havnina, fyrr enn landsstýrismaðurin var komin aftur av uttlandsferð.

Lagt var at bryggju í Bergen hósdagin 8. juli klokkan 16.30, og vóru teir liggjandi til mánakvøldið 12. juli. Klokkan 20.00 var loyst frá landi. Kós varð sett móti Føroyum, og Tjaldrið kom í Nólsoyarfjørð týskvøldið 13. juli klokkan 23.00.

Av tí at Tjaldrið ikki skuldi koma at bryggju fyrr enn kl. 10.00, morgunin eftir, tá hátíðarhald var fyriskipað, var akker kastað uttarliga í Nólsoyarfyrði.

**Stórur dagur, íð bíða hevur verið eftir leingi.**

Mikumorgunin, klokkan 10.00, kom so Tjaldrið fram úr tokuni og stevndi inn um Molan. Umframt at nakrir av landsins frægastu monnum vóru møttir upp at heilsa skipinum vælkomið, lá ein russiskur og ein bretskur trolari ytst á brimgarðsbryggjuni, og andlitini vóru tøtt í brúgvagluggunum á hesum báðum skipum, sum við áhuga skoðaðu nýggja føroyska varðhundin, sum skuldi hjálpa til at halda føroyskt sjóøki frítt fyri veiðitjóvum.

**Tjaldur ver vælkomið......**.
Stutt eftir at skipið hevði lagt at bryggju, var farið stuttan framsýningartúr út í Nólsoyarfjørð við innbodnum gestum, m.a. umboðum fyri Landsstýrið, Færøernes Kommando og Føroya Sjómansskúla.
Gestirnir fingu høvið at síggja, hvussu skipið var innrættað, hvørju tól tað hevði at arbeiða við bæði sum vaktarskip og ikki minst sum bjargingarskip.

**Fær skjótt politimyndugleika.**
Á framsýningartúrinum, har bjóðað var til borðs, helt Petur Reinert, landstýrismaður í fiskivinnumálum røðu og segði millum annað:” Hetta er ein stórur dagur, ið bíðað hevur verið eftir leingi, tí hetta er fyrstu ferð, at føroyingar fáa egið sjóverjuskip. Verður leita aftur í søguna, hava vit kortini áður havt føroyska sjóverju. Í 16. øld hevur maður á Eiði havt bát, ið skuldi ansa eftir, at ólógligur fiskiskapur ikki fór fram á føroysku fiskimiðunum. Um hann minnir navnið Skútunestoft á Eiði. Tað skerst ikki burtur, at vit hava havt okkurt at funnist at viðvíkjandi sjóverjuni, men nú er tað upp til okkum sjálvar at fáa skil á hesum. Skipið hevur tvær uppgávur 1) at røkja sjóverjuna, tí føroyska sjóøki verður alsamt størri. og 2) at røkja bjargingartænastu. Landsstýrið hevur gjørt av, at føroyski parturin av sjóververjuni verður sjálvstøðugur stovnur, ið skal byggjast út, men tað er alt um at gera, at hetta verður gjørt í góðum samstarvi við donsku sjóverjuna. Tað er mín vón, at hetta samarbeiðið má vera gott, nú vit skulu flyta fiskimarkið út á 200 fjórðingar á nýggjárinum komandi 1. januar 1977 til gagns fyri okkum allar, og at sjóverjan kemur at liggja í tryggari legu. Landsstýrið er í løtuni í samráðingum við avvarðandi danskar myndugleikar um politimyndugleika. Eg havi ta uppfatan, at einki er í vegin frá danskari síðu fyri at hetta skip fær politimyndugleika,” segði Petur Reinert at enda og ynskti skipi og manning góða eydnu.

**Positivt.**

Leiðarin á Vaktar- og Bjargingartænastuni Hjalgrim Bech segði í stuttari røðu, at vit her høvdu fingið eitt gott amboð, og hann helt at tað vera ógvuliga positivt, at føroyingar gera nakað sjálvir fyri at røkja stórar uppgávur, ístaðin fyri at líta á danir. Hann segði, at hann var sannførdur um, at samarbeiðið millum føroysku Vaktar- og Bjargingartænastuna og Marinustøðina fór at verða hitt besta.

**Gott úrslit.**

Ovastin á Marinustøðini C. A Reib segði, at hann helt úrslitið av fyrsta føroyska sjóverjuskipinum vera sera gott. Hann segði seg undrast á, at skipið á fleiri økjum var betri útgjørt enn tey donsku verjuskipini. Um samarbeiðsspurningin segði Reib: "Tað er einki at ivast í, at leggja vit ikki áherðslu á at fáa gott samarbeiði í lag í framtíðini, kemur onki gott at spyrjast burturúr. Tí haldi eg, tað vera eina sjálvfylgju, at vit hjálpast at við at røkja uppgávurnar, og vit eru sinnaðir fyri at veita alla hjálp, ið krevst til hetta."

Stjórin á Føroya Sjómansskúla, Pól Johannes Johannesen, helt eisini røðu og segði, at hann helt skipið verða sera væl útgjørt, men tó saknaði hann astikkin, men hann man kanska fara at koma. Hann segði, at hann vónaði, at møguleikar fara at bjóðast næmingum á skúlanum at sleppa út at sigla við skipinum, sum vónandi ikki fer at verða ov nógv upptikið av bjargingarferðum.

**Vaktarskiftið umborð á Tjaldrinum.**

Mánadagin 19. juli kom so nýggj manning umborð á Tjaldrið, og var hetta manning A, sum saman við manning B kom at sigla skipið nógv ár framyvir.

| | Manning A | Manning B |
|---|---|---|
| Skipari: | Kaj P Mortensen | EyðbjørnLervig |
| Yvirstýrimaður. | Elmar Højgaard | A. C. Samuelsen |
| 1. Stýrimaður: | Levi Christiansen | Jógvan P. Lydersen |
| Maskinstjóri: | Jóan Jakke Poulsen | Sofus Johansen |
| 1. Meistari: | Almfinn Jacobsen | Jógvan Hammer |
| Kokkur: | Niclas Djurhuus | Harry Jacobsen |
| Dekkari: | Harry Strøm | Páll Poulsen |
| Dekkari: | Jens Midjord | John Kjærbo-eystan Á |
| Dekkari: | Óla Hans Olsen | Eivind Bech |

Heimildir:
Dimmalætting 1976
14. septembur
Skipsdagbókin av Tjaldrinum 1976
Dagblaðið 1976